Frágreiðing um kommunalu roknskapirnar fyri 2025
Sambært kommunustýrislógini skulu kommunustýrini hava samtykt, og sent landsstýrinum/landsstýrismanninum í fíggjarmálum, ársroknskapin fyri undanfarna ár innan 1. juni árið eftir.

Tikið verður samanum heildargongdina hjá kommununum í árinum.

Í talvuni niðanfyri sæst samantalt úrslit fyri kommunurnar fyri 2025:

Ársroknskapur 2024 og 2025 umframt fíggjarætlan 2026 samantalt fyri allar føroyskar kommunur

	(tús. Kr.)	2024	2025	*%-broyting*	2026FÆ	*%-broyting*
§ 1-7	Rakstur, netto	2.667.259	2.784.233	*4,4%*	2.905.377	*4,4%*
	Løgur, netto	1.016.751	802.405	*-21,1%*	808.386	*0,7%*
§ 1-7	**Tilsamans**	**3.684.010**	**3.586.638**	***-2,6%***	**3.713.763**	***3,5%***
§ 20	Rentur, netto	44.247	55.105	*24,5%*	62.468	*13,4%*
	Skattur v.m.	3.380.405	3.601.338	*6,54%*	3.596.515	*-0,1%*
§ 20	**Tilsamans**	**3.336.158**	**3.546.233**	***6,3%***	**3.534.047**	***-0,3%***
	Úrslit (RLÚ)	**-347.852**	**-40.405**	***-88,4%***	**-179.716**	***344,8%***

Viðm.: "Rakstur, netto" er rakstrarinntøkur minus rakstrarútreiðslur. Samsvarandi er við "Løgur, netto" og "Rentur, netto". "Skattur v.m." eru øll sløg av skatti minus rentustuðul.

Til samanberingar vísir talvan eisini samantald roknskapartøl fyri 2024 og fíggjarætlanartøl fyri 2026[1] umframt prosentbroytingar í mun til árið frammanundan.

Rakstrar og løguvøkstur
Samanlagt høvdu kommunurnar hall á 40,4 mió. kr. í 2025. Hetta er ein betran á 307,4 mió. kr. í mun til hallið á 347,8 mió. kr. í 2024. Broytingin kemur av lækking í løgum á 214,3 mió. kr. og hækking í skatti á 220,9 mió. kr. Hinvegin hækka útreiðslurnar til rakstur við áleið 117 mió. kr., og rentuútreiðslurnar hækka við 10,9 mió. kr.

Inntøkur og útreiðslur størri/minni ella ætlað
Í fíggjarætlanunum fyri 2025[2] varð upprunaliga roknað við 169,9 mió. kr. í halli. Hetta merkir at hóast hall, er úrslitið 129,5 mió. kr. betri enn ætlað. Orsøkin til hetta er, at samlaðu inntøkurnar av skatti vóru góðar 256,7 mió. kr. hægri, enn upprunaliga væntað. Hinvegin vóru bæði rakstrar og løguútreiðslurnar hægri enn upprunaliga ætlað, meðan rentuútreiðslurnar vóru um 3 mió. kr. minni enn upprunaliga mett.

Búsketterað er við halli fyri 2026
Ein samanteljing av fíggjarætlanunum fyri 2026 vísir, at roknað verður við einum halli á 179,7 mió. kr.. Hetta merkir at kommunurnar samanlagt rokna við einum úrsliti fyri 2026, ið er góðar 139 mió. kr. lakari enn staðfesta hallið fyri 2025. Umframt øktar rakstrarútreiðslur á 121,1 mió. kr., og øktar løguútreiðslur á um 6 mió.kr. er orsøkin, at kommunurnar buskettera við hægri rentuútreiðslum á 7,4 mió. kr. og eitt vet lægri inntøkum frá skatti, 4,5 mió. kr. minni, enn skattainntøkurnar í 2025.

[1] Fíggjarætlanartølini 2026 eru uttan eykajáttanir.
[2] Fíggjarætlanartølini 2025 eru uttan eykajáttanir.

Nettoskuldin hjá kommununum er minni enn mest loyvda skuld. [3]
Talvan niðanfyri vísir nøkur høvuðstøl frá roknskapinum fyri 2025. Eingin kommuna er omanfyri markinum fyri mest loyvda skuld, skuldarloftinum. Runavíkar kommuna er við árslok 2025 uppi á 93 prosentum, og Klaksvíkar kommuna 87 prosentum. Skopunar-, Eystur-, Sands- og Fuglafjarðar kommuna eru omanfyri einari helvt av skuldarloftinum. Hinar kommunurnar liggja allar undir einari helvt, harav nakrar kommunur onga nettoskuld hava 31. desember 2025.

Samanumtikið er fíggjarliga rásarúmið hjá kommunum tilsamans um 2,4 mia. kr.

Yvirlit yvir kommunalu roknskapirnir 2025, í tús. kr. ***(Skipað eftir skuldarlutfalli í mun eina álikning roknaða við kommunuskatti á 23% .)***

Kommununavn	Fólkatal við ársenda 2025	Kommunu skattaprosent	Rakstur	Løgur	Rentur	Skattur v.m.	RLÚ-úrslit	Inntøku-grundarlag fyri skuldarloft	Nettoskuld 31.12.2025	Nettoskuld per íbúgva	Nettoskuld í % av inntøku grundar-lagnum
Runavík	4.439	21,50%	229.259	108.200	10.853	-313.685	34.626	298.984	278.761	62,8	93%
Klaskvík	5.537	20,75%	306.265	54.175	12.479	-395.014	-22.094	411.989	358.715	64,8	87%
Skopunar	487	20,85%	30.269	4.920	818	-32.222	3.785	34.115	23.575	48,4	69%
Eystur	2.287	19,90%	132.837	42.610	2.813	-153.293	24.966	158.944	109.029	47,7	69%
Sands	542	20,75%	30.620	16.308	888	-36.400	11.416	38.521	25.213	46,5	65%
Fuglafjarðar	1.639	21,25%	92.154	43.548	2.881	-124.635	13.948	115.376	70.089	42,8	61%
Eiðis	763	18,75%	37.588	21.134	442	-43.522	15.643	50.733	22.360	29,3	44%
Sunda	1.787	20,45%	93.910	34.839	1.559	-117.618	12.690	125.195	51.815	29,0	41%
Sjóvar	1.286	21,00%	62.075	12.500	1.250	-76.918	-1.092	80.372	28.526	22,2	35%
Hvalbiar	631	19,95%	36.617	4.256	699	-42.868	-1.296	43.053	14.794	23,4	34%
Tvøroyar	1.697	20,90%	88.851	20.222	1.832	-110.496	409	116.274	38.667	22,8	33%
Vágs	1.327	20,90%	71.578	6.046	1.075	-83.579	-4.879	85.276	27.305	20,6	32%
Nes	1.618	20,50%	75.537	22.760	1.084	-99.622	-240	105.044	32.610	20,2	31%
Skálavíkar	168	21,00%	10.608	1.878	237	-12.146	578	12.763	3.296	19,6	26%
Vága	2.183	21,25%	116.317	16.417	2.583	-143.028	-7.711	147.887	56.851	26,0	38%
Sørvág	1.255	21,00%	65.096	24.708	1.231	-88.324	2.710	89.054	20.233	16,1	23%
Kvívíkar	602	21,00%	35.372	3.147	569	-42.075	-2.987	43.560	9.252	15,4	21%
Tórshavnar	23.476	19,00%	1.098.729	325.893	11.148	-1.476.726	-40.957	1.681.736	331.449	14,1	20%
Hov	105	18,00%	6.160	496	42	-6.889	-190	6.896	559	5,3	8%
Porkeris	324	21,00%	17.977	-24	114	-19.771	-1.703	20.940	-158	-0,5	-1%
Viðareiðis	329	20,50%	16.769	12.898	136	-24.699	5.103	25.379	-696	-2,1	-3%
Vestmanna	1.256	20,90%	65.315	17.708	43	-83.115	-50	86.391	-11.669	-9,3	-14%
Famjins*	73	16,00%	4.017	1	68	-5.271	-1.184	6.773	-1.019	-14,0	-15%
Hvannasund	426	19,75%	24.611	5.383	259	-29.030	1.223	28.859	-5.873	-13,8	-20%
Sumbiar	333	19,00%	17.042	1.517	1	-18.629	-69	20.530	-4.828	-14,5	-24%
Kunoyar	145	18,50%	7.983	528	0	-10.551	-2.040	11.347	-5.052	-34,8	-45%
Húsavíkar*	112	20,00%	7.496	331	0	-7.973	-147	8.661	-3.990	-35,6	-46%
Skoúvoyar	35	16,00%	2.352	0	0	-3.202	-850	4.149	-2.559	-73,1	-62%
Fugloyar*	48	16,00%	829	5	0	-37	798	40	-2.540	-52,9	-6349%
	54.910	**19,97%**	**2.784.233**	**802.405**	**55.105**	**-3.601.338**	**40.405**	**3.858.839**	**1.464.715**	**27**	**38%**

Kelda: BSL (Búskaparskipan landsins).
* Hava ikki latið samtyktan roknskap inn.
Inntøkugrundarlag fyri skuldarloft, sí notu 3.

[3] **Kommunustýrislógin §43:**
Stk. 2. [3)] Er nettoskuldin meira enn árliga inntøkugrundarlagið hjá kommununi frá persónsskatti og flytingum frá landinum, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkugrundarlagið og nettoskuldin skal roknast.

Hesar reglur eru ásettar í **§1.** í kunngerð nr. 167 frá 20. desember 2023 um at rokna inntøkugrundarlag og nettoskuld sambært kommunustýrislógini

§ 1. Inntøkugrundarlagið hjá kommununi, sum verður nýtt til at áseta skuldarmark, fevnir um hesar inntøkur:
1) Persónsskattur.
2) Skattur av eftirløn sambært løgtingslóg um eftirløn.
3) Endurgjald sambært løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir.
Stk. 2. Persónsskatturin verður roknaður við einum útrokningarskattaprosenti á 23% uttan mun til kommunuskattaprosentið í tí einstøku kommununi.